## Skúlamál dregur út

Um smáar tríggjar vikur hevur skúlin á Ziskatrøð í Klaksvík hvørki skúlastjóra ella varaskúlastjóra. Skúlastjórin seinastu mongu árini, Asbjørn Lómaklett, er farin frá fyri aldur, og um smáar tríggjar vikur fer varaskúlastjórin, Eigil Hentze, eisini frá. Hvat so hendir, veit eingin. Trupulleikin er, at arbeitt verður við bygnaðarbroytingum í skúlunum í Klaksvík, men at málið hevur drigið út. Sambært kommununi bíða tey eftir mentamálaráðnum.

## Ov fáar kvinnur

Alt ov fáar kvinnur sita í leiðandi størvum í føroyska vinnulívinum. Í dag eru umleið 300 kvinnuligir stjórar í parta- og smápartafeløgum, meðan talið á monnum í tilsvarandi størvum er 2.250, skrivar Vinnuvitan. Formaðurin í Javnstøðunevndini, Kári á Rógvi, sigur við blaðið, at tað ber ikki til bara at bíða, og tí heldur hann, at politikararnir mugu seta almenn tiltøk í verk, so fleiri kvinnur kunnu koma í leiðandi størv í vinnuni.

# Bárður á fund við Fíggingargrunnin

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur higartil havt ta fatan, at Fíggingargrunnurin hevur fylt løgtingssamtyktini til punkt og prikkar. Bárður Nielsen viðgongur, at avgerðin hjá Jóhannus Egholm Hansen kom óvart á hann, og sigur tað vera óheppið so tætt upp undir einskiljingina. Tí hevur hann kallað inn til fundar í dag**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Sjálvandi havi eg reagerað upp á fráboðanina hjá Jóhannus Egholm Hansen. Tað gjørdi eg longu, tá tíðindini frættust í gjár við at biðja um fund við Fíggingargrunnin á middegi í dag, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður, tá vit spyrja um hansara viðmerkingar til, at næstformaðurin í nevndini hjá Føroya Banka, Jóhannus Egholm Hansen, nú tekur seg aftur úr nevndini.

– Eg havi alla tíðina lagt dent á, at samtyktin skal fylgjast, og ta er eisini mín fatan, at hetta hevur verið gjørt til punkt og prikkar, staðfestir Bárður Nielsen.

### Kom óvart á hann

Bárður Nielsen viðgongur, at tíðindini komu óvart á hann.

– Eg havi havt ein varuga av, at arbeiði hevur koyrt rættiliga væl, fyri at siga sum er, og tí kom tað óvart á meg, tá eg hoyrdi tíðindini í gjár, sigur Bárður Nielsen.

Hann sigur eisini, at tað er óheppið við eini slíkari fráboðan so tætt upp undir einskiljingina, men metir kortini ikki, at tað fer at ávirka samlaða søluvirði hjá bankanum.

– Nei, tað meti eg ikki. Tað er einki óvanligt við stórum rembingum í støðum sum hesum, tað hava vit sæð aðrastaðni eisini, heldur Báður Nielsen, sum metir, at tað er potentialið hjá bankanum sum er avgerandi fyri prísin.

Annars segði landsstýrismaðurin, at hann illa gjørt ítøkiligar viðmerkingar til málið, fyrr enn eftir fundin við Fíggingargrunnin á middegi í dag, sum jú var eftir evstamark at okkara var farið.

## Fíggingargrunnurin ikki lagt seg út í virksemi bankans

Fíggingargrunnurin vil ikki loyva Føroya Banka at selja partabrøv til ávís fólk, áðrenn bankin verður einskildur, men annars hevur grunnurin ikki lagt seg út í virksemi bankans. Tað segði Eyðun á Rógvi, formaður í Fíggingargrunninum, við Útvarpið á middegi í dag, sum aftursvar til ákærurnar frá nú fráfarna næstformanninum í nevndini hjá Føroya banka Jóhannus Egholm Hansen.

Jóhannus Egholm Hansen sigur millum annað, at Føroya Banki leggur forðingar fyri, at bankin kann fremja vakstrarætlan sína uttanlands, men hesum afturvísti Eyðun á Rógvi í tíðindunum í útvarpinum.

Formaðurin í Fíggingargrunninum segði eisini við útvarpið, at hann ikki metti, at tað var av stórvegis týdningi, at Jóhannus Egholm Hansen hevur tikið seg úr nevndini, og útvarpið staðfesti eisini,

# Næstformaðurin í nevnd Føroya Banka fer frá

**Jóhannus Egholm Hansen, næstformaður í nevndini hjá Føroya Banka, hevur tikið seg úr nevnd bankans. Ósemja við Fíggingargrunnin um fleiri ymisk viðurskifti, eru orsøkin til, at Jóhannus Egholm Hansen fer frá**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi til miðlarnar seinnapartin í gjár, boðaði Jóhannus Egholm Hansen frá, at hann hevur tikið seg úr nevnd bankans, vegna ósemju um við Fíggingargrunnin um fleiri viðurskifti í samband við einskiljingina av bankanum.

Jóhannus Egholm Hansen er advokatur og undirstjóri í børsskrásettu donsku stórfyritøkuni FLSmidth.

Hann sigur, at Fíggingargrunnurin leggur forðingar fyri, at Føroya Banki kann fremja vakstrarætlan sína, sum varð samtykt av nevnd bankans fyri hálvumøðrum ári síðani.

– Føroya Banki hevur stórliga brúk fyri meira professionellum eigur enn hann hevur, sigur Jóhannus Egholm Hansen.

– Tað er tí óheppið, at stríðið millum næstformann bankans og nevnd Fíggingargrunnsins fær hesa avleiðing so stutt undan eini skráseting av Føroya Banka á føroyska virðisbrævamarknaðinum og á danska børsinum, heldur hann.

– Hetta kann møguliga órógva einskiljingargongdina og skapa iva um vakstrarætlan bankans eftir at einskiljingin er framd. Hinvegin er tað ein natúrlig avleiðing, at tá ið ein nevndarlimur er ósamdur við tí partaeigara, hann er valdur av, tekur nevndarlimurin seg aftur, sigur nú fráfarni næstformaðurin.



# Djurholm stuðlar Eidesgaard í flaggmáli

**Landsstýrismaður finst at partamanni fyri at leggja uppskot til samtyktar um at steðga løgmanni at seta á stovn sendistovu í Íslandi, tí hon skal flagga við Dannebrog. Bjarni Djurholm setir spurnartekin við, um ikki ketan er lopin fullkomiliga av, tá heitt verður á løgmann um at bróta lógina, sum eitt samt Løgting samtykti beint fyri jól**

UMBOÐAN
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Seinastu vikuna hevur mikil orðadráttur verið um føroysku sendistovuna í Íslandi, sum verður partur av donsku sendistovuni og harvið eisini kemur at flagga við Dannebrog. Hetta undrar landsstýrismannin við vinnumálum, Bjarna Djurholm, sum vísir á, at løgmaður í sambandi við fíggjarlógina fekk undirtøku at seta á stovn sendistovu í Reykjavík. Tað hendi, tá 32 tingmenn og harvið eitt samt Løgting samtykti, at sendiumboð Føroya skuldi vera partur av donsku attachéskipanini í Íslandi.

Í einum lesarabrævi í blaðnum í dag setir Bjarni Djurholm spurnartekin við, um ikki ketan púrasta er lopin av, tá fyrispurningar í Tinginum, viðgerð í fjølmiðlunum og nú uppskot til samtyktar um at steðga løgmanni í Íslandi, eru komin undan kavi.

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta er tað sama sum at biðja løgmann bróta lógina, sum eitt samt Løgting samtyki 21. desember í fjør.

Hann heldur, at bæði fyrispurningar og uppskot til Løgtingið, sum hansara egni partamaður, Poul Michelsen, hevur lagt fram, bert eru eftirrationaliseringar.

»Nú verður symbolikkurin dyrkaður fyri at tekkjast nøkrum veljarum, skrivar Bjarni Djurholm og leggur afturat, at sjálvandi skal Merkið í húnar hátt í Reykjavík, og sjálvvandi skulu vit hava ta tign, sum okkum tilkemur sum tjóð. Hesum virkar løgmaður fyri. Tað álit hevur undirritaði á honum,« skrivar landsstýrismaðurin.

»Men at viðgera spurningar og uppskot í tinginum um at steðga løgmanni og

framhald á síðu 26